# Ummælisskriv

## Felagið Peningastovnar

**Felagið Peningastovnar:** Í lógini verður víst til danskar myndugleikar í td. § 56 - eigur hetta at vera føroyskir myndugleikar víst verður til. Somuleiðis verður víst til cpr.nr. og ikki p-tal (td. í § 11).

***Fíggjarmálaráðið:*** *cpr.nr. er rættað til p-tal í uppskotinum og víst verður nú til føroyskar myndugleikar í § 56.*

**Felagið Peningastovnar:** Dagførdir almennir listar við PEP kundum eiga at koma samstundis sum lógin verður sett í gildi.

***Fíggjarmálaráðið:*** *Sambært donsku myndugleikunum á økinum, so ber ikki til at gera dagførdan lista fyri Føroyar við PEP[1] kundum longu til 1. apríl, tá lógin fær gildi. Ein slíkur listi skal gerast í samstarv við donsku myndugleikarnar og skal lýsast við kunngerð í Føroyum.*

**Felagið Peningastovnar:** Skipanir skulu dagførast, um krøvini í lógini skulu lúkast. Hetta kann taka drúgva tíð, tí má gildiskoman, sum er sett til 1. apríl, verða útsett minst tríggjar mðr.

***Fíggjarmálaráðið:*** *Tað er av stórum týdningi at lógin fær gildi samstundis sum "Lov for Færøerne om oplysninger der skal medsendes ved pengeoverførsler". Tí verður hildið fast við, at lógin fær gildi frá 1. apríl 2019. Viðkomandi eftirlitsmyndugleikarnir á økinum eru kunnaðir um støðuna og geva bankunum neyðuga skotbráið, soleiðis at hesir fáa neyðugu viðurskiftini uppá pláss.*

## Uttanríkis- og vinnumálaráðið (UVMR)

**UVMR:** Komptencen at regulere udbydere af spil må derfor anses at være overgået til Færøerne, og en evt. regulering heraf i forhold til hvidvask, må derfor ske i lagtingslov.

***Fíggjarmálaráðið:*** *Uppskotið er tillagað til føroysk viðurskifti samsvarandi hoyringssvarinum frá UVMR.*

## Landsbanki Føroya

**Landsbanki Føroya:** Landsbankin hevur havt samskifti við peningastovnarnar og teir ynskja eisini eina tílíka lóg og koma annars við viðmerking um serlig føroysk viðurskifti.

---

[1] PEP stendur fyri politiskt eksponerede personer. Slíkar persónar vera mettir at hava størri sannlíkindi fyri at verða útsettir fyri mutri eg/ella mutursroyndum.